# Tá konan sigur upp …

»Familjens projektleder siger op« er enn ein rasandi metseljandi svensk femibók. Hesaferð um karrierukvinnu, sum ikki tímir at hava evstu ábyrgdina av heiminum longur, og tí sigur frá sær starvið sum verkætlanarleiðari í heiminum. Bókin er eitt sindur stuttlig, men bara fyri hana, sum hevur ein vánaligan mann og tí kennir seg aftur í offur- ella martyrleiklutinum.

Hjá henni, sum hevur ein búnan og ábyrgdarfullan mann, er bókin bæði troyttandi og pínlig. Ikki minst tí maður høvundsins, sum er til í veruleikanum onkrastaðni í Svøríki, verður útspiltur og úthongdur úr enda í annan.

Á baksmekkuni á bókini skrivar høvundin soleiðis:

Hervið sigi eg frá mær starvið sum verkætlanarleiðari í familjuni. Eitt starv, sum eg hvørki havi søkt, havi natúrligt talent fyri ella haldi vera serliga stuttligt. Hetta kemur givið at ávirka familjuna á ymsan hátt:

1. Børnini koma at ganga í klæðum, sum ikki passa ella hóska saman.
2. Tey fara at mangla fimleikaklæði og túr-matpakkar.
3. Sosiali álmanakkin fer í hundarnar.
4. Tað verður óruddiligt og fer at lukta illa har heima. Kortini sigi eg meg úr starvi. Frá og við í dag hevur familjan ongan verkætlanarleiðara. Eg fari at nýta høvi til at ynskja tær, elskaða manni mínum, góða eydnu.

*V. Gunilla Bergensten, kona tín*




# Fíggjarkreppan – eitt fantastiskt hugskot

Tað er løgið bæði at vera áskoðari og leikari í lívsins sjónleiki. Fyri eini løtu síðan var alt skrúvað upp á fult bluss, eydnan lá í einum skáaláni, sum bleiv brúkt til eitt egg, ein Ingálv og eina Harley. Nú hevur alt hetta brádliga ongan týdning longur. Út við tingum og inn við dýpd, innihaldi og meining. Nú skulu vit vera nakað fyri hvørt annað, gera mun í heiminum og dansa okkum út úr kreppuni.

Presturin Anna Mejlhede var skjót at lofta tíðarandanum og skrivaði bókina "Må man godt danse alligevel?", sum er ein kerlig áminning og stuttlig vegleiðing gjøgnum persónligu fíggjarkreppuna. Tí, sum ein kona segði: Hendan fíggjarkreppan er eitt fantastiska gott hugskot!







# Blýantar við grønari samvitsku

Nýggir lip- og eyelinarar frá TROMBORG úr vistfrøðiligum tilfari. Eyelinari í tveimum litum og lip-linari í fimm litum. Fáast til keyps í Klivanum fyri 140 krónur.

# Ray-Ban heldur ár um ár



Vart tú ein av teimum mongu, sum keypti einar hvítar Wayfarer frá Ray-Ban í fjør? So ert tú heppin, tí klassisku brillurnar, sum nú eru at finna í øllum litum, eru eisini in í ár. Soleiðis er við klassikarum: Teir fara ikki av móta. Annars eru stórar rundar sólbrillur tað heilt stóra í ár. Og so teir stóru klassisku í svørtum, beige ella við leopard prenti. Men djørvu typurnar fara sjálvandi í einar kulørtar í summar.

# Hevur tú keypisjúku?



Her eru nøkur tekin um, at tú hevur keypisjúku.

1. Bankakonto. Um tú brúkar fleiri pengar enn tú eigur, ella lænir pengar at nøkta keypitørvin við.
2. Óbrúkt ting. Um tú eigur nógvar lutir, sum tú hevur keypt, men ongantíð brúkt.
3. Lygn. Um tú roynir at krógva innkeyp ella lýgur um, hvat tey kosta.

# Annar hvør shopaholikari er ein maður

Keypisjúka verður vanliga sett í samband við ósikrar kvinnur í 30unum. Men fleiri amerikanskar kanningar vísa, at annar hvør shopaholikari er ein maður. Eisini í Danmark eru nógvir keypisjúkir menn. Á viðgerðarstovninum Dansk Misbrugsbehandling er triði hvør sjúklingur mannfólk. Men menninir keypa onnur ting enn kvinnurnar. Til dømis amboð, ur, elektroniska útgerð, list og design. Yngru menninir keypa eisini ofta klæðir, skógvar og belti, meðan teir eldru heldur keypa amboð.

# *Heitur og tølandi summarangi*

Hot Summer er eksotiskur summar-avloysari hjá vælumtóktu røðini við White Musk frá The Body Shop. Við hesum sensuella, blómukenda anganum, kemur summarið veruliga upp á kók bæði dag og nátt.

